# Uttanríkis- og mentamálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 16. apríl 2021 |
| Mál nr.: | 21/00032 |
| Málsviðgjørt: | HZH/TH |
| Ummælistíð: | / |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Kunngerð
um
próvtøkur á gymnasialum miðnámi á sumri 2021**

Við heimild í § .... í løgtingslóg nr. .... frá .... og § 19 í løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2012 um gymnasialar miðnámsútbúgvingar verður ásett:

**§ 1.** Í løgtingslóg um gymnasialar miðnámsútbúgvingar,
verða ásetingarnar í § 1, stk. 8 og § 18, stk. 1 og 2 settar úr gildi.
*Stk. 2.* Próvtøkur, sum eru skipaðar sambært løgtingslóg um gymnasialar miðnámsútbúgvingar og kunngerð um próvtøkur í miðnámsútbúgvingunum, verða í 2021 skipaðar sambært skjali 1.

**§ 2.** Broytingarnar sambært § 1 umfata bert, hvussu nógvar próvtøkur næmingar skulu til. Broytingarnar umfata ikki galdandi reglur um fyrireikingartíð, hjálparmiðlar, próvdøming, próvtøl, kærumøguleikar o.tíl.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann eftir umsókn frá útbúgvingarstovni góðkenna frávik frá ásetigunum í hesi kunngerð, tá ið umsóknin er grundað á óvanlig viðurskifti.

**§ 3.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Uttanríkis- og mentamálaráðið, dagfesting

**Jenis av Rana**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

**Skjal 1**

**Heitið á skjalinum**

**Yvirlit yvir próvtøkur á gymnasialum miðnámi á sumri 2021**

| **Gymnasialt miðnám** | **Próvtøkur** |
|---|---|
| 3. árs næmingar á hugbreyt, búskaparbreyt og náttúrubreyt | Farið verður til próvtøku sambært raðfestingarlistanum, tó verða tvær tær fyrstu skrivligu próvtøkurnar strikaðar. Ársmet verða flutt til próvmet í hesum báðum lærugreinum. |
| 3. árs næmingar á tilfeingisbreyt og tøknibreyt. | Farið verður til próvtøku sambært raðfestingarlistanum, tó verða tvær tær fyrstu skrivligu próvtøkurnar, sum ikki eru tøkni og tilfeingi strikaðar. Ársmet verða flutt til próvmet í hesum báðum lærugreinum.<br>Um næmingur bert hevur eina skrivliga próvtøku útyvir tøkni og tilfeingi, verður tøkni/tilfeingi strikað. |
| 2. árs næmingar á fyrireinkingarbreyt. | Farið verður til próvtøku sambært raðfestingarlistanum, tó verða tvær tær fyrstu skrivligu próvtøkurnar strikaðar. Ársmet verða givið í staðin fyri próvmet í hesum báðum lærugreinum. |
| 1. og 2. árs næmingar á øllum breytum og næmingar, sum taka útbúgvingina yvir fleiri ár, og ikki eru á síðsta ári. | Farið verður til próvtøku sum vanligt. |
| Næmingar, sum taka útbúgvingina yvir fleiri ár, og eru á síðsta ári. | Farið verður til próvtøku sambært raðfestingarlistanum, tó verða tvær tær fyrstu skrivligu próvtøkurnar strikaðar. Ársmet verða flutt til próvmet í hesum báðum lærugreinum.<br>Um næmingur bert hevur ein skrivliga próvtøku verður hendan strikað. Ársmet verða flutt til próvmet í hesi lærugrein.<br>Um næmingur bert hevur munnligar próvtøkur verður farið til próvtøku sum vanligt. |
| Stakgreinalesandi | Farið verður til próvtøku sum vanligt. |
| Sjálvlesandi | Farið verður til próvtøku sum vanligt. |